MERKISDAGAR

75 ára føðingardagur
Mánadagin 13. juli verður Sólborg Dulavík á Argjum 75 ár. Dagurin verður hildin hósdagin 16 juli í hølunum hjá Argja Bóltfelag frá kl 19.00. Øll eru vælkomin.

70 ára føðingardagur
5. juli fylti Páll Poulsen, skipari, Hvalba 70 ár. Føðingardagurin verður hildin heima leygardagin 11. juli frá kl. 11.00 til 16.00. Øll eru vælkomin.

Silvurbrúdleyp
13. juli hava Per og Joan Højgaar Leirvík silvurbrúdleyp. Opið hús verður í missiónshúskjallaranum frá kl. 18, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Gullbrúdleyp
Mánadagin 3. august hava hjúnini Nansy og Niclas Thomasen, Vágur, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Jónsborg leygardagin 8. august frá kl 19, har øll eru vælkomin.

Prógv
Randi M. Simonsen fekk 29. juni prógv sum lækni á Syddansk Universitet.

Brúdleyp
Leygardagin 11. juli giftast Dávur Berg Saltnes, og Fríða R Olsen Rituvík. Vígslan verður í Rituvíkar kirkju kl. 13. Eftir vígsluna verður vælkomst í B68-húsinum á Svangaskarði frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Brúdleyp
Leygardagin 11. juli kl. 13 giftast í Dronninglund Slotskirkju Hanna Suh Møller úr Dronninglund og Eirikur Rasmussen úr Tórshavn. Brúdleypið verður hildið á Dronninglund Slot. Brúdleypsadressan: Porcevej 1, 9330 Dronninglund.

Brúdleyp
Fríggjadagin 17. juli giftast í Malmö Elin Gunnarsdóttir av Ólafsfirði og Helgi Wacher úr Tórshavn. Brúdleypið verður hildið á Heleneholm Slott, Ystadvägen 23, S-214 45 Malmö.

Brúdleyp
Leygarmorgunin 18. juli kl. 9, giftast í Rituvíkar kirkju, Vígdis Danielsen av Glyvrum og Jónstein Petersen úr Saltangará. Vælkomst verður í Sjókafeini frá kl. 12 - 15. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Brúdleyp
Leygardagin 18. juli kl. 15 giftast í Sandavágs kirkju Sigga C. á Stongunum, Tórshavn og Magnus Eyðunsson Simonsen, Sandavágur. Brúdleyp verður hildi fyri innbodnum í SÌF húsinum í Sandavági kl. 19.

Brúdleyp
Leygardagin 18. juli kl. 16 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík, Randi Tøllefsen, Norra og Poul Jóhan Andreasen, Klaksvík. Brúdleyp verður fyri innbodnum í Skálanum kl. 19.

Brúdleyp
Leygardagin 18. juli giftast Joan Poulsen og Janus úr Dímun. Vígslan verður kl. 13 úti í Torvanesi/"Prinsessugerði" á Eiði. Aftaná verður lítið ábit Úti á Bø 54. Døgurði verður fyri innbodnum í hølunum hjá Starvsmannafelagnum (í Tórshavn) kl. 16 og eftir kl. 20 er opið hús, har øll eru hjartaliga vælkomin til ein bita og/ella okkurt gott til høvdið.

Brúdleyp
Leygardagin 18. juli giftast Rósa Henryson, Tvøroyri og Harry Thomsen, Hvalba. Vígslan verður í Salem kl.13. Eftir vígsluna verður móttøka, har øll eru vælkomin. Veistla verður fyri innbodnum á Seglloftinum kl. 19.

Brúdleyp
Fríggjadagin 24. juli kl. 15 giftast í Vesturkirkjuni Halla Nolsøe Poulsen úr Froðba og Poul Gudmundsson úr Fuglafirði. Dagurin verður hildin fyri innboðnum á Hotel Føroyum kl. 19.

Brúdleyp
Leygardagin 25. juli kl. 15.00 giftast í Tvøroyrar kirkju Susan Nattestad, Hvalba, og Svend Ingi K. Madsen, Kvívík. Veitslan verður hildin fyri innbodnum kl. 19.00 á Seglloftinum, Tvøroyri.

Brúdleyp
Leygardagin 25. juli kl. 14 giftast í Sandavágs kirkju, Heidi S. Haraldsen, Sandavágur, og Bjarni E. Prior, Miðvágur. Veitslan verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Miðvági kl. 19.

Brúdleyp
Sunnudagin 26. juli giftast Sarah Hansen (Sandavágur) og Jón Suni Christiansen (Vestmanna) í Sandavágs kirkju kl. 13. Tey, íð ynskja at gleða okkum á okkara degi, eru vælkomin í SíF húsi í Sandavági, frá kl. 14. til kl. 20.

Brúdleyp
Leygardagin 1. august kl. 14.00 giftast í Glyvra kirkju Maria Hansdóttir Tausen, Saltangará, og Høgni Lamhauge, Lamba. Brúdleyp verður fyri innboðin í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.30.

Brúdleyp
Leygardagin 1. aug. kl. 9.30 giftast í Kvívíkar kirkju, Anni Joensen, Kollafjørður og Ragnar Isaksen, Kvívík. Tey, ið ynskja at gleða okkum á okkara stóra degi, eru vælkomin í bygdarhúsi í Kollafirði frá kl. 10.30 til kl. 16.30.

Brúdleyp
Fríggjadagin 7. august kl. 12 giftast í Vesturkirkjuni. Meifríð Weihe Hansen, Tórshavn og (Bryan) Mahendran Subramaniam, Penang, Malaysia. Brúdleypið verður frá kl. 17 við sjálvtøkuborðhaldi í Starvsmannafelagshúsinum J.H. Schrøtersgøta 9. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við okkum, vinarliga sigið frá innan 25. juli á tlf. 319588, sms á tlf 219588 ella við e-post meiweiha@olivant.fo

Brúdleyp
Leygardagin 8. august kl. 14. giftast í Skopunar kirkju Súsanna Hansen, Skopun, og Ove V. Davidsen, Glyvrar. Brúdleypið verður hildið frá kl. 18 við sjálvtøkuborði í heimi okkara, Ognarvegur 5, Skopun. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Brúdleyp
Fríggjadagin 7. august kl. 17 giftast í Vesturkirkjuni Dánial Hoydal og Jóhanna Reginsdóttir av Steinum. Veitsla verður um kvøldið fyri innbodnum í Sjónleikarhúsinum í Havn.

Brúdleyp
Leygardagin 8. august kl. 15 giftast í Vesturkirkjuni Saloma Vatnhamar Johannesen, Leirvík og Rógvi Ólavsson á Heygum, Tórshavn. Veitslan verður í AB-húsinum eftir kl. 18. Tey ið ynskja at heilsa uppá brúðarparið, vinarliga sigi frá innan 25. juli á 319986 og 272953.

Brúdleyp
Leygardagin 15. august kl. 13 giftast Selma Kristiansen, Æðuvík, og Teitur Herup Olsen, Tórshavn, í Havnar kirkju. Veitslan verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.30. Bussar koyra úr Havn kl. 17. Tey, sum vilja gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á +45 27578645 (Selma), +45 50525554 (Teitur), 504761 (Jóna og Niels Juul) ella 317862 (Birna og Regin) áðrenn 15. juli. Viðmerkið vinarliga, um tit skulu við bussinum.

Brúdleyp
Leygardagin 15. august giftast Rannva E. Hammer og Bárur Tindskarð. Víglsan verður í Ebenezer kl. 14 og vælkomst í Róðrarneystinum á Argjum kl. 19. Tey sum vilja gleða okkum við at koma, kunnu ringja áðrenn 1. august til 581712 (Rannva) ella 275852 (Bárur).

HEILSANIR

Góða fitta lítla systir
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum í dag. Eg eri so góð við teg:)
Heilsan
Beinta

Hey Kristina
Tú ert ófør – flott klárað -. Hjartaliga tillukku við próvnum. Eisini tillukku til Vónbjørt.
Kærar heilsanir fastir tín

Góða elskaða Súsanna
Mamma og babba ynskja tær hjartaliga tillukku við 5 ára føðingardegnum í dag. Vit elska teg

Sosialurin
Heilsanir
kr. 30,-

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 1 dag fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Mán. ☐ Týs. ☐ Mik. ☐ Hós. ☐ Frí.

Tekstur:

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn:

Bústaður:

Bygd/býur: Tlf.:

Sendið lepan, v/mynd og gjald til:
Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: **>>Heilsanir<<**